# Heildarmyndin verður gruggað

**Bjørn Kalsø heldur, at málið viðvíkjandi bjargingini av Jøkulfelli er blást alt ov nógv upp. Sjálvur sigur hann seg hava fult álit á umsiting sínari, men at føroyska tilbúgvingin fyri tað bæði kann og verður betrað**

TILBÚGVING
*Jákup Mørk*



*Landsstýrismaðurin sigur, at hansara fatan framvegis er, at bjargingararbeiðið viðvíkjandi Jøkulfelli gekk væl. Men at batar sjálvandi kunnu gerast í hesum*

- Bæði undan og eftir kanningina av Jøkulfell-bjargingini hevði eg ta fatan, at arbeiði hevði gingið væl. Sjálvandi eru lutir, sum kunnu betrast, og tað verður eisini arbeitt við hesum. Men at leggja málið út, sum um alt gekk illa, er at blása málið heilt út av proportiónum.

Tað heldur Bjørn Kalsø, nú tað aftur verður sáddur ivi um handfaringini av nógv umrøddu bjargingini. Bæði handfarinini av sjálvum bjargingararbeiðnum, og nú eisini politisku handfaringini av málinum.

Við politisku handfaringini verður serliga sipað til fyrispurningin, sum Torbjørn Jacobsen, tingmaður, setti á tingið, har hann vildi hava at vita, hvørt løgmaður visti nakað um málið, áðrenn fyrispurningurin varð reistur á tingið.

Essensurin í hesum er helst meira av politiskum slag enn nakað annað. Tí tað, sum tingmaðurin her í veruleikanum vil hava at vita, tykist vera, um upplýsingar vóru fjaldar fyri tinginum, inntil ein óheft kanning varð sett í verk.

## Málið er gruggað

Sum svar upp á fyrispurningin segði løgmaður, at hann hevði ikki hoyrt um trupulleikarnar í bjargingini, fyrr enn fyrsta fyrispurningin frá Torbjørni Jacobsen. Og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum sigur framvegis, at heldur ikki hann visti um nakrar trupulleikar undan hesum.

Hetta seinasta tykist undra fleiri. Ikki minst tá Sjónvarpið í Degi og Viku kundi staðfesta, at umsitingin hjá Bjørn Kalsø var kunnað um hetta longu sama dag, sum bjargingin varð framd.

- Tað er sjálvandi rætt, men akkurát hatta haldi eg var at taka eitt brot úr heildini. Sjálvandi verður ein eftirmeting gjørd í hvørjum einstøkum føri, og eg verði eisini kunnaður um tey mál, sum umsitingin heldur hava størsta týdningin. Í hesum førinum hevur tó ikki verið mett, at júst tann upplýsingin var so átrokandi neyðug at geva mær, og tað er so tað. Sjálvandi kann tað hava verið ein skeiv meting, men eg má siga, at eg eri sera fegin um, at eftirfylgjandi kanningin frá Norsk Veritas staðfestir, at bjargingin í flestar mátar gekk væl. Og tað haldi eg eisini er undirstrikað av, at bæði MRCC og Færøernes Kommando eftirfylgjandi hava fingið stórt rós fyri sín leiklut í bjargingini.

- At sama kanning so eftirfylgjandi er taglað sundir í bitar, har ting eru tikin úr heildini, soleiðis at tey skulu líkjast einum lemjandi kritikki, er at grugga málið púrasta til, sigur Bjørn Kalsø.

Men eftirfylgjandi ber væl til at siga, at tú skuldi verið kunnaður um trupulleikarnar. Millum annað við tyrlutilbúgvingini. Kanst tú sum landsstýrismaður hava álit á umsitingini eftir hetta.

- Tað haldi eg avgjørt. Og fatanin her í húsinum hevur verið og er framvegis, at arbeiðið viðvíkjandi Jøkulfell gekk væl. Sjálvandi er tað harmiligt, at upplýsingar koma fram á tann hátt, at ein tingmaður hevur fingið eitt tipp um nakrar upplýsingar, sum eg ikki havi. Og gekk tað rætt fyri seg, so máttu tær upplýsingar heldur komið til mín, enn at leka út til aðrar partar.

## Skal virka betur

Hóast Bjørn Kalsø staðfestir, at hansara fatan - og fatanin í Fiskimálaráðnum sum heild - er, at bjargingararbeiðið við Jøkulfell gekk væl, so ásannar hann tó samstundis, at tað er rúm fyri batum.

- Tí má eg enn einaferð siga, at eg eri sera fegin um frágreiðingina. Tí hon er í nógvar mátar ein konstruktivur kritikkur, soleiðis at vit meira málrættað kunnu gera av, hvar vit skulu betra okkum, sigur Bjørn Kalsø, og vísir á, at arbeiði hesum viðvíkjandi longu er farið ígongd.

Eitt nú er eitt samskipanarráð gjørt, soleiðis at stovnarnir, sum eru við í tilbúgvingini, kunnu samskifta enn betri. Skeiðsvirksemið er intensiviserað, eins og ein ávís útveksling við fólki er fingin í lag. Hetta seinasta soleiðis at fólk í føroysku tilbúgvingini kunnu fáa royndir frá størri skipanum, har frekvensurin av slíkum tilburðum er hægri, og at royndirnar á tann hátt gerast fleiri.

Samstundis verður arbeitt við nøkrum bygnaðarbroytingum, soleiðis at øll tilbúgvingin kann verða í eini meira náttúrligari legu.

### Leiðarin tykist offraður

Í øllum hesum er tó eisini ein spurningur, sum tað enn ikki hevur verið tosað um so nógv um.

Síðani sjóbjargingarstøðin varð sett á stovn, hevur tað verið Djóni Weihe, sum hevur verið leiðari á hesari. Og tí kann tað tykjast sera óheppið, nú broytingar og umstrukatureringar verða framdar, at tann embætismaðurin, sum kanska hevur drúgvastu royndirnar í so máta ikki er við. Serstakliga ikki, tá bæði landsstýrismaðurin og Fiskimálaráðið halda fast við rættleikanum í teimum avgerðum, sum hesin framdi í Jøkulfell-málinum. Eitt mál, sum hevur havt við sær, at leiðarin ikki longur er í starvinum.

- Lat meg fyrst undirstrika, at Djóni Weihe er altso ikki sagdur úr starvinum, sigur Bjørn Kalsø, tá vit leggja hendan spurningin fyri hann.

- Vit samdust um, at hann var leiðari, meðan kanningin fór fram, og eftirfylgjandi hevur hann søkt um farloyvi, og hetta er játtað. Seinast er so tað hent, at partarnir eru samdir um, at tað nyttar lítið at lata heilan stovn liggja í leiðsluloysi, tí leiðarin er í farloyvi, og tí verður í næstum søkt eftir nýggjum stjóra til MRCC-støðina. Men fyri tað verður á ongan hátt sagt, at Djóni Weihe ikki skal aftur í nakra funktión í hesum samanhanginum. Tað er nakað, sum tíðin fer at vísa, staðfestir landsstýrismaðurin at enda.

**-mørk**

## VIÐMERKINGAR

# Ølfagnaður

**Johan Mortensen**
*Pf Restorffs Bryggjarí*



Tiltakið ØLFAGNAÐUR á Hotel Føroyum seinasta vikuskiftið var sera væleydnað. Umleið 500 ølglaðir føroyingar fingu høvi at smakka upp á 22 ymisk sløg av øli, og fyri fyrstu ferð var fyriskipað ein almenn blindsmakking av pilsnarøli, har luttakararir kundu atkvøða um, hvønn øl tey hildu smakkaðu best. Urslitið var:

Royal hjá Unibrew: 131 atkvøður
Tarvur hjá Restorff: 112 atkvøður
Veðrur hjá Føroya Bjór: 94 atkvøður
Hof hjá Carlsberg: 66 atkvøður

Persónliga eru vit sera fegnir um góða undirtøkuna fyri Tarvinum, hesum sera vælsmakkandi pilsnarinum við munchernermalti.

Hotel Føroyar eigur stórt rós uppiborið fyri hetta stóra tiltak, ølinum at frama, og tað er at vóna at hetta verður eitt árligt afturvendandi tiltak. Bert spell at Hotel Føroyar og fjølmiðlarnar eru siktaðir fyri brot á rúsdrekkalógina fyri at lýsa við hesum óføra tiltaki. Enn eitt dømi uppá at okkara rúsdrekkalóg er avoldað og vóna vit at Vinnumálaráðið fer at taka stig til at broyta hana í heyst.

Tað er at fegnast um at áhugin her á landi fyri øli er støðugt vaksandi.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

